# aftur kappast



hálvt ár gekk eg runt í ekstasu. Eg hevði ikki verið niðri í 8 ár og skuldi niður heilt einsamøll. Eg hevði sjálvandi familju niðri, men eg kendi meg øgiliga lítla, tá eg kom inn í Park Café, har upptøkuroyndirnar vóru hildnar. Har vóru so nógv fólk, og tey reypaðu um hvussu væl tey sungu, at tey dugdu at syngja t.d. Celine Dion og annað tílíkt. Eg minnist, at eg hugsaði, at tey ikki vóru so kul, sigur Guðrun.

## Feilur í fylgispælinum

Undir sjálvari upptøkuroyndini vóru luttakararnir tiknir inn 5 í senn. Guðrun skuldi syngja næstsíðst, og hetta legði hana undir stórt trýst.

– At standa har og hoyra hini syngja so væl, oyðilegði sjálvsálitið, greiður hon frá. Støðan gjørdist ikki betri av, at tann, ið hevði spælt Promise Me inn á fløgu til Guðrun at syngja eftir, hevði spælt hann inn hægrið enn Guðrun plagar at syngja hann. Har var einki annað at gera, enn at syngja hann hægri enn vanligt, men tað gekk fínt. Guðrun kom víðari, og víðari og víðari, til hon stóð eftir sum vinnari av eini tí mest eftirhugdu sjónvarpssangkappingunum í Danmark nakrantíð.

## Hevði ikki tíð til at hugsa

– Tað var feitt, eg var úti og spældi nærum hvønn dag. Eg spældi konsertir, var í studio ella sat eg í flogfarið á veg til Føroyar, har eg royndi at gera meg lidnan við student (hetta eydnaðist eisini). Eg hevði slett ikki tíð til at hugsa um hvat hendi. Vit, sum høvdu luttikið í Stjerne For En Aften sungu til nógv tiltøk saman, og hvørja ferð vit søgdu bei, var tað ringt. Vit høvdu verið saman ígjøgnum eina heilt serliga uppliving. Eg havi enn samband við onkran av teimum, greiður Guðrun frá. Hon sigur, at hon lærdi nógv av hesi tíðini, hetta hevur eisini givið henni nógv sambond.

– Eg hugsaði ikki so nógv um hvat hendi, men tók bara alt av einum silvurfati. Men eg haldi, at eg lærdi hvussu eg skal tacklað tílíkt. Eg veit ikki, um eg hevði klárað hatta einaferð afturat uppá handan mátan, ella um eg ynski tað. Eg fekk eitt slag av niðurtúri, tá tað leið móti endanum, tá tað gjørdist truplari, og eg noyddist at arbeiða fyri at halda tí í gongd. Hetta var eitt sindur áðrenn seinnu fløguna.

## Ongantíð aftur kappast

Tað var eisini um hetta mundi, at Guðrun á øðrum sinni luttók í Stjerne For En Aften. Í hesi kapping kom Guðrun í finaluna, men tað gjørdist vinmaður hennara Jacob Andersen, ið vann. Luttøkan var ein góð uppliving fyri Guðruna, men hon sigur samstundis, at hetta sannførdi hana um, at hon ongantíð aftur vildi kappast í tónleiki.

– Eg fór við, tí eg helt tað kundi verið stuttligt, og við eini nýggjari fløgu á veg, helt eg, at hetta kundi hjálpa við fløgusøluni. Men eg minnist, hvussu tað var at standa har í finaluni. Eg visti longu frammanundan, at Jacob fór at vinna, tí eg hevði hoyrt hansara framførslu og tað var ordiliga uppiborið. Hann er eisini ein vinmaður, so eg var glað hansara vegna, men samstundis eitt sindur kedd, og eg vildi ikki virka ónatúrliga glað, soleiðis at tað virkaði falskt. Tá avgjørdi eg, at eg ongantíð vil setast í bás á handan hátt aftur. Eg vil burtur frá tílíkum. Hetta er eisini orsøkin til, at eg havi takkað nei, í tvey ár á rað til at syngja í melodi grand prixnum, sigur Guðrun.

## Leitar eftir lagskrivara

– Eg vil hava eina fløgu við tilfari, sum er ordiligt konserttilfar. Eg havi skrivað nógvar tekstir og havi løgini inni í høvdinum, nú skal eg bara finna tann rætta persónin at samstarva við um at gera fløguna. Eg fái ikki livað uttan tónleik. Men eg vil gera tað ordiligt hesaferð, sigur Guðrun, ið væl dugur at síggja møguleikar fyri at samstarva við føroyskar lagskrivarar ella plátufeløg.

– Tutl er fari undir annað virksemið enn bara at geva lidnar fløgur út, so tað kundi kanska áhugavert, sigur Guðrun at enda.

**Guðrun er á myspace, vitjað hana á myspace.com/gudrunsj**